# Nýtt verkhús í Sørvági

**Verkhúsið við virkistilboðum til fólk við breki, sum Sørvágs Kommuna hevur bygt, er latið Serforsorgini, og brúkararnir kunnu nú fara til arbeiðis**

VIRKISTILBOÐ
*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Enn eitt verkhús við virkistilboði til fólk við ymsum breki er latið upp. Sørvágs Kommuna hevur latið húsini gera, og Serforsorgin leigar so frá kommununi. Umframt dagtilboð eru eisini fimm pláss til umlætting í húsinum. Hetta húsið er tað sjeynda av slíkum slagi, sum Serforsorgin nú hevur.

Týsdagin var samkoma í nýggjum snotiligu hølunum í Sørvági. Talan er um eini eldri hús, sum eru umbygd og í ávísan mun eisini nýgjørd fyri umleið fýra milliónir krónur, sigur Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvágs Kommunu.

Eivin Jacobsen, borgarstjóri, greiddi frá gongdini í málinum, frá byrjan til nú, hesi snotulgu hølini standa klár i Sørvági.

Líknandi tilboð hevur síðan 1999 verið í Sørvági. Talan er um eitt tilboð, sum verið hevur í skúlanum, men sum nú mátti flytast, tí skúlin sjálvur hevur brúk fyri teimum hølunum, sum har eru.

Tað var táverandi bygdarráðsformaðuriní Sørvagi, Petur Kruse, sum fekk hugskotið, og var drívmegina aftan fyri, at tað varð gjørt til veruleika, segði Eivin Jacobsen. Hann setti sær fyri, at fáast skuldi ein virðilig loysn á hesum málinum, og tað málið, sum tá varð sett, er nú nátt.

Eivin Jacobsen handaði síðan Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í almanna- og heilsumálum, lykilin til húsið.

Hans Pauli Støm, landsstýrismaður, takkaði Sørvágs Kommunu fyri aktivan og ábyrgdarfullan leiklut í heusm málinum. Hann fegnaðist um tilboðið, sum bøtir um tøvin og hjálpir upp á manglar, sum hann tók til. Eisini var hann hugtikin av tí, fingið er burtur úr hesum hugnaligu húsunum.



*Rannvá og Rúna vóru sjálvsagt millum tey mongu, sum komin vóru til móttøkuna í Sørvági týsdagin*

*Mynd: Edvard Joensen*

Men hann ætlaði sær ikki at hava lykilin leingi, segði hann og lat hann víðari til Bjarna Clementsen, leiðara á Serstovnadeildini.

Bjarni Clementsen fegnaðist eisini um úrslitið. Eisini hann takkaði Sørvágs Kommunu fyri at hava tikið hetta stigið og fullført tað.

Hann segði, at hesi fimm árini, síðan byrjað varð í Sørvágs Skúla, hevði dúgliga verið leitað eftir hóskandi hølum at vera í. Men einki var funnið, sum kundi metast nøktandi. Hann helt ikki, at tað var nakar í Vágum, sum kendi so nógvar kjallarar og so nógv neyst sum hann.

Hann vísti á, at talan er um tilboð til alla oynna og væntaði, at nú umstøðurnar eru so góðar, fara fleiri at gera brúk av tilboðunum enn higartil, tá talan hevur verið um hálvdagstilboð í skúlanum.

Eisini vísti hann á, at eitt av rúmunum er innrættað soleiðis, at tað kann nýtast til handil ella café, har til ber at selja tað, sum gjørt verður á verkstaðnum ði húsinum.

Eisini Bjarni Clementsen vildi sleppa skjótt av við lykilin og lat hann víðari til Súsan Tavsen, leiðara í húsinum.



*Bjarni Clementsen, leiðari á Serstovnadeildini, hevur júst handað Súsan Tavsen, leiðara í verkhúsinum í Sørvági, lykilin*

*Mynd: Edvard Joensen*



*Hans Pauli Strøm, landstýrismaður, lurtar eftir, hvat borgarstjórin í Sørvági hevur at fortelja*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Trygging í nýggjum hølum

**Tryggingarfelagið Føroyar hevur flutt deild sína í Vágum úr Miðvági til Sandavágs**

TRYGGING
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Børnini úr dagstvnunum í Vágum fingu ballónir fáa Trygingarfelagnum, tá tey komu at heilsa upp á klovnar og búktalarar í Sandavági fríggjadagin fyr hvítusunnu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sandavági:** Virksemi er nú aftur í bygninginum, sum Føroya Sparikassi átti og helt til í í Sandavági. Tryggingarfelagið Føroyar hevur keypt hann og er flutt inn við deildini í Vágum. Trý fólk starvast á deildini.

Fríggjadagin fyri hvítusunnu var samkoma í nýggju tryggingarhølunum í Sandavági.

Mortan Poulsen, stjóri á Tryggingarfelagnum Føroyum, helt røðu, har hann greiddi frá, at felagið eina tíð hevði leitað eftir betri egnaðum hølum enn teimum, felagið hevur hildið til í í Miðvági.

Funnið varð fram til hesi hølini í Sandavági, sum Føroya Sparikassi átti. Gjørt varð av at keypa húsini og flyta skrivstovuna úr Miðvági til Sandavágs.

– Tryggingarfelagið hevur nú funnið høli, sum eru væl egnað til endamálið, segði Mortan Poulsen, og vísti á, at hetta var grundin til, at flutt varð júst til Sandavágs.

– Tað kundi tað sama verið hvar sum helst aðrastaðni í oynni, segði hann.

Í samband við, at tryggingin hevur latið upp í egnum hølum, varð eisini gjørt av at lata eina gávu til eitthvørt endamál, ið hevði við oynna alla at gera.

Gjørt varð av, at lata Vága Dansifelag eina peningagávu, sum brúkast skal í samband við umvæling av felagshúsunum hjá Dansifelagnum, Beitishúsunum í Miðvági.

Formaðurin í Vága Dansifelag tók móti gávuni, sum var ein kekkur áljóðandi 20.000,- krónur, og segði í takkarrøðu síni, at peningurin fór at verða nýttur til at leggja nýtt tak á húsini.

Eisini til børnini var okkurt hendan dagin, tryggingin flutti til Sandavágs.

Á økinum uttan fyri bygningin var undirhald við klovnum og búktalarum, sum børnini í dagstovnunum í Vágum stuttleikaðu sær óført saman við. Eisini fingu tey ballónir og okkurt drekkandi sum minni um hesa vitjan í Sandavági.



# Føroya Tele sendir 30 fólk til hús

**Versnandi útlit og fallandi inntøkur er orsøkin til, at leiðslan í Føroya Tele hevur gjørt av at senda 30 fólk til hús. Andras Róin kann ikki við vissu siga, um fleiri fólk verða send heim.**

30 FÓLK TIL HÚS
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tann barski búskaparligi veruleikin er við at seta síni spor í føroyska samfelagið. Í januar mánaði í ár vórðu sekstan fólk uppsøgd á Føroya Sparikassa, og nú stendur ein onnur stór fyritøka fyri tørni.

Føroya Tele sendi mikumorgunin tíðindaskriv um, at 30 fólk eru send til hús. Grundgevingin er, at útlitini ikki eru eins góð og áður fyri kjarnuvinnurnar hjá Føroya Tele. Stjórin í Føroya Tele, Andras Róin, sigur, at bæði inntøkurnar av privatum og vinnuligum kundum er nógv lækkað.

Leiðslan á stovninum heldur tað er neyðugt at taka avleiðingarnar av hesum í tøkum tíma.





*– Uppsøgdu fólkini er bæði høg og lá. Talan er bæði um limir í starvsmannafelagnum og arbeiðarafeløgunum, eins og akademikarar, sigur Andras Róin*

## Mist 20 %

Andras Róin greiðir frá, at Føroya Tele hevur mist 20% av samlaða føroyska marknaðinum. Økta kappingin á fjarðskiftismarknaðinum og versnandi búskaparútlitini er høvuðsorsøkin.

– Vit kenna okkum noydd at fremja hesar tillagingar. Starvsfólkini bera góðan helmingin av samlaða rakstrarútreiðslunum hjá Føroya Tele, og tí hava vit valt at spara á starvsfólkaøkinum. Vit síggja eisini stórar møguleikar við nýggja húsinum fyri effektiviseringum og rationaliseringum á stovninum, og hesin partur er eisini við í avgerðini, sigur Andras Róin.

Stjórin á Føroya Tele fortelur, at skerjingin í starvsfólkatalinum rakar breitt. Talan er bæði um starvsfólk í miðstaðarøkinum og uttan fyri miðstaðarøkið.

– Uppsøgdu fólkini er bæði høg og lá. Talan er bæði um limir í starvsmannafelagnum og arbeiðarafeløgunum, eins og akademikarar, sigur Andras Róin.

Í dag arbeiða góð 260 fólk á Føroya Tele, og uppsagnirnar hava við sær, at starvsfólkatalið á stovninum lækkar við góðum 10% í næstum

## 47 mió. kr í avlopi

Føroya Tele hevði eitt rakstaravlop á 47 mió. krónur í fjør. Leiðslan hevur kortini avgjørt at siga 30 fólk úr starvi longu í juni 2004.

*Hvussu hongur tað saman?*

Tølini fyri fyrsta ársfjórðing í ár vísa eina stóra afturgongd sammett við somu mánaðir í fjør. Inntøkurnar eru lækkaðar við eini helvt, og fyri at fyribyrgja, at støðan gerst verri, hava vit tikið hetta stigið. Hetta er sjálvssagt ómetaliga harmiligt, greiðir Andras Róin frá.

Hann leggur afturat, at skerjingin í starvsfólkatalinum fær ikki veruliga ávirkan fyrr enn í 2005, tí flestu starvsfólkini hava eina uppsagnarfreist á eitt hálvt ár.

## Óvist

Spurdur, um fleiri starvsfólk á Føroya Tele kunna vænta at fáa eina uppsøgn við postinum komandi mánaðirnar, svarar Andras Róin, at tað er ógvuliga ilt at meta um.

– Vit vita ikki hvussu búskaparstøðan kemur at verða. Heldur verandi støða fram, kunnu vit ikki lova, at fleiri fólk ikki verða send heim, tí vit eru noyddir til at gera tær tillagingar, ið einaferð eru neyðugar. Men sum sagt, alt er rættiliga óvist, fortelur Andras Róin. Føroya Tele ætlar at veita uppsøgdu starvsfólkunum hjálp. Leiðslan á stovnunum fer seta í samband við fakfeløgini, og kanna møguleikarnar fyri skeiðum og víðari- og eftirútbúgving til uppsøgdu starvsfólkini.

# Samstarvið styrkast

**Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, sigur, at samstarvið millum oyggjasamfeløgini fyri sunnan, Hetland, Orknoyggjar og Suðuroyggjar, kann geva føroyingum størri ávirkan í ES, tá laksaútflutningur verður umrøddur í Brússel**

SAMSTARV FYRI SUNNAN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Politiskur leiðararnir úr Hetlandi, Suðuroyggum, Føroyum og Orknoyggjum ynskja at menna samstarvið millum oyggjasamfeløgini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

– Hesar oyggjarnar hava havt somu trupulleikar í alivinnuni við ILA, sum vit hava í dag. Vit kunnu ogna okkum virðismikla vitan um, hvussu vit koma trupulleikunum í alivinnuni til lívs við einum mennandi samstarvi við hesar oyggjar, sigur løgmaður Jóannes Eidesgaard.

Alivinnan er eitt av samstarvsøkjunum, ið politisku leiðararnir úr Hetlandi, Suðuroyggjum, Orknoyggjum og Føroyum hava avrátt at samstarva um. Síðan sunnudagin hava teir tríggir politisku leiðararnir í oyggjasamfeløgunum fyri sunnan vitjað Føroyar. Partarnir hava undirskrivað eina felagslýsing um, at bondini millum oyggjasamfeløgini skulu styrkast.

Teir fýra leiðararnir fyri oyggjasamfeløgini hava avrátt, at samstarvast skal um økini, fiskatilfeingi og umsiting, havbúnaður, oljuleiting og framleiðsla, undirstøðukervi, mentan og ítrótt og varandi orku.

## Ávirka ES

Á tíðindafundið seinnapartin týsdagin greiddi løgmaður frá, at eitt samstarv við oyggjasamfeløgini fyri sunnan kann hjálpa føroyingum at fáa størri ávirkan í ES, tá laksaútflutningur verður umrøddur í Brússel.

Øll trý oyggjasamfeløgini fyri sunnan eru limir í Evropasamveldinum ígjøgnum Stóra Bretland.

## Undirstøðukervið

Sandy Cluness úr Hetlandi, Alex Macdonald úr Suðuroyggjum og Stephan Hagan greiddu frá, at teir síggja stórar samstarvsmøguleikar innan flutning.

Allir triggir róstu føroyska undirstøðukervinum, har Norrøna fleiri ferðir varð havd á lofti sum ein frálíkur møguleiki fyri flutningi millum londini.

Ráðformaðurin í Orknoyggjum sýndi eisini stóran áhuga í undirsjóartunnlinum í Vágum, og segði seg vilja kanna tunnilsverkætlanirnar í Føroyum gjøllari.

## Hittast komandi ár

Umboðini fyri Hetland, Suðuroyggjar, Orknoyggjar og Føroyar hava avrátt at hittast aftur komandi ár til at halda á við at menna samstarvið millum oyggjasamfeløgini.

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard segði á tíðindafundinum, at samgongan raðfesti samstarvið millum oyggjasamfeløgini høgt, og samgongan fór at streingja á fyri at styrka enn meir um samstarvið.

Fundurin komandi ár verður hildin á Suðuroyggjum.